UTTAN ÚR HEIMI

# Hann fekk tíggju ferðir lívlangt fongsul



Dennis Rader kann í fyrsta lagi royndarleyslatast um 40 ár, men tá verður hann 100

Mynd: Reuters

**– Eg vóni, at ein dag fer Guð at góðtaka meg, segði drápsmaðurin Dennis Rader, tá hann fekk dómin**

DÓMUR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tann 60 ára gamli Dennis Rader hevur greitt frá, at tað vóru illir andar, sum fingu hann at beina fyri tíggju fólkum í árunum frá 1974 til 1991.

Løgreglan í amerikanska statinum Kansas stóð á berum øll árini. Drápsmaðurin nevndi seg BTK "bind, torture, kill" (bind, pín, drep), men hóast stór løgreglulið royndu at loysa gátuna, bleiv hann ikki avdúkaður.

Ikki fyrr enn í februar í ár bleiv Dennis Rader tikin, og í juni viðgekk hann, at hann hevði beint fyri sjey kvinnum, einum manni og tveimum børnum. Hósdagin fekk hann revsingina: Lívlangt fongsul fyri hvørt morðið.

– Eg vóni, at ein dag fer Guð at góðtaka meg. Tað hevur verið myrkt, men eg haldi, at eg hómi ljósið nú, segði Rader, tá hann hevði fingið dómin.

Kansas hevur deyðarevsing, men hon bleiv ikki sett í gildi fyrr enn í 1994 og tískil aftan á morðini, og tí kann Rader ikki dømast til deyða.

# Nógvar danskar fyritøkur svikaðu í Irak

**Nógvar danskar fyritøkur skulu greiða ST frá, hvussu tær bóru seg at við at fáa sáttmálar við stýrið hjá Saddam Hussein. Ein fyritøka hevur viðgingið, at hon rindaði irakum pengar fyri at fáa sáttmálar í Irak**

MUTUR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Hetta er sera álvarssamt, og tað harmar okkum, at tveir av okkara starvsmonnum hava medvirkað til mutur, segði stjórin á stóru donsku fyritøkuni Grundfos, Jens Jørgen Madsen, eftir at Berlingske Tidende hevði avdúkað, at Grundfos hevði latið irakskum embætismonnum pengar aftur fyri at fáa sáttmálar við Irak.

Sambært blaðnum rindaði Grundfos irakskum embætismonnum pengar aftur fyri sáttmálar í 2001 og 2002. Ætlanin var at gera tað sama í 2003, men álopið á Irak gjørdi, at ætlanin bleiv slept. Teir báðir starvsmenninir hjá Grundfos hava fingið sekkin, men sambært ST er Grundfos ikki tann einasta danska fyritøkan, sum hevur svikað seg til sáttmálar við Irak.

Upplýsingarnar eru komnar fram í sambandi við, at ein serlig kanningarnevnd hjá ST hevur granskað, hvat Irak brúkti sínar oljupengar til, tá ST loyvdi stýrinum hjá Saddam Hussein at selja olju, so landið kundi keypa mat og heilivág til fólkið. Hetta var í árunum frá 1996 til 2003.

Sambært Berlingske Tidende vísir frágreiðingin hjá nevndini, at minst 73 danskar fyritøkur samstarvaðu við Irak í hesum tíðarskeiðinum, og at pengarnir, sum tær fingu burturúr, komu frá olju fyri matskipanini. Danska vinnu- og byggistýrið hevur upplýst fyri blaðnum, at hesi árini seldu danskar fyritøkur irakum vørur og tænastur fyri 3,2 milliardir krónur.

ST-kanningarnevndin hevur nú biðað tær donsku fyritøkurnar greiða frá sambandinum, sum tær høvdu við Irak í hesum árunum. Tær skulu eisini upplýsa, hvørjar fyritøkur tær kappaðust við fyri at sleppa inn á irakska marknaðin, og hvørjum fyritøkum tær samstarvaðu við.

Sambært Berlingske Tidende hava einar tíggju danskar fyritøkur spurt seg fyri, hva tær skulu svara ST. Svarið frá Ídnaðarfelagnum er, at tær skulu siga sannleikan.

Amerikanska fregnartænastan CIA hevur fyrr roknað út, at útlendskar fyritøkur rindaðu irakskum embætismonnum minst 1,7 milliard dollarar í mutri. Fyrrverandi danski ST-embætismaðurin Henrik Olesen, segði við Berlingske Tidende í gjár, at trygdarráðið hjá ST gjørdi eitt stórt mistak, tá tað lat irakar umsita sáttmálarnar við tær útlendsku fyritøkurnar, tí tað gjørdi tað møguligt hjá fyritøkunum at rinda irakum mutur, uttan at ST kundi halda eyga við tí.

## Krevja hann frá

Løgregluovastin í London, Sir Ian Blair, er komin í álvarssamar trupulleikar, eftir at fjølmiðlarnir hava avdúkað, at hann segði ikki sannleikan, tá ein løgreglumaður skjeyt tann 27 ára gamla brasilska elektrikaran Jean Charles de Menezes í síðsta mánað.

Tá greiddi Ian Blair frá, at brasilin rann undan teimum báðum løgreglumonnunum, sum hildu eyga við honum. Eitt nú segði Ian Blair, at brasilin smeyg sær ígjøgnum ferðaseðlaeftirlitið í undirgrundarbreytini uttan at gjalda. Men myndaupptøkur hava síðani avdúkað, at hetta var ikki so. Myndirnar vísa, at Jean Charles de Menezes rindaði ferðaseðilin við gjaldskorti, og at hann eisini gav sær stundir til at fáa sær eitt av teimum ókeypis bløðunum, sum fólk kunnu fáa sær. Maðurin rann sostatt ikki undan løgreglumonnunum, men kortini bleiv hann skotin sjey ferðir í høvdið.

Sakførarin Harriet Wistrich, sum kannar málið, sigur við BBC, at alt, sum løgregluovastin segði um tilburðin, var ósatt, og at eingin í løgregluni gjørdi nakað fyri at fáa sannleikan fram. Tí heldur hopn, at Ian Blair eigur at fara frá.

Brasilska stjórnin er eisini sera misnøgd við frágreiðingina hjá løgregluni í London, og stjórnin hevur kunngjørt, at hon fer at gera sína egnu kanning av tilburðinum fyri at fáa sannleikan fram.

## Meiriluti fyri nýggjari stjórn

Stórur spenningur er um úrslitið av norska stórtingsvalinum í heyst, og fleiri veljarakanningar eru gjørdar í seinastuni.

Fyrrakvøldið kunngjørdi Norsk Gallup eina kanning, og hon vísti, at stjórnarskifti verður aftan á valið. Kanningin gav Arbeiðaraflokkinum 32,6 prosent av atkvøðunum, Sosialistiski Vinstraflokkurin fær 14,6 prosent og Miðflokkurin 6 prosent. Verður hetta úrslitið, fáa teir tríggir andstøðuflokkarnir 95 tinglimir, meðan høgravongurin fær 74.

Kanningin hjá Gallup vísir, at allir teir tríggir stjórnarflokkarnir hava havt afturgongd í seinastuni. Framburðsflokkurin, sum tryggjar stjórnini meiriluta í Stórtinginum, hevur eisinin havt afturgongd sambært kanningini.

## Sjórænarar rænt ST-skip

Síðani tann 27. juni hava sjórænarar havt ræðið á einum farmaskipi, sum var á veg til Somalia við 850 tonsum av rísi til tey mogu, sum mistu hús og heim av flóðalduni annan jóladag í fjør.

Skipið var 30 fjórðingar úr landi, tá sjórænararnir tóku ræðið umborð, og eingin veit, hvat er hent teimum tíggju monnunum, sum vóru við skipinum. Sjórænararnir kravdu 500.000 dollarar í loysigjaldi fyri skip og manning, men ST, sum hevur sent skipið til Somalia, sýtti fyri at gjalda. Samstundis hevur ST biðið somalisku stjórnina leggja trýst á sjórænararnar, men tað hevur ikki givið nakað úrslit.

Herfyri eydnaðist tað so at fáa samband við sjórænararnar, sum játtaðu at lata skip og manning leys, um teir fingu ein part av rísinum afturfyri. Hetta góðtók ST, men síðani er einki hent, og sjórænararnir hava ikki latið frætta frá sær.

Flóðaldan annan jóladag í fjør kravdi umleið 200 mannalíuv í Somalia, og umleið 2.500 útróðrarbátar fóru í sor, tá flóðaldan kom inn á land.

## Kann halda fram

Seinastu nógvu árini hevur Yoweri Museveni verið forseti í Uganda, og nú er tjóðartingið sinnað at broyta lógina, so hann kann halda fram í embætinum eftir valið í mars næsta ár.

Higartil hevur ugandiska stýrisskipanin sagt, at eingin kann sita í forsetaembætinum meiri enn fimm valskeið, og tað fimta valskeiðið hjá Museveni rennur út í mars næsta ár. Men tjóðartingið sigur, at hann sleppur at stilla uppaftur, um hann vil.

Museveni tók valdið í Uganda í 1986. Í mong ár bleiv hann roknaður sum ein, ið kundi snara Afrika á eina nýggja og meiri demokratiska kós, men tey, sum finnast at honum, siga, at hann hevur verið ov einaráðandi tey seinnu árini.